UTTAN ÚR HEIMI

## USA ávarar um yvirgang

Amerikanska stjórnin mælir nú sínum ríkisborgarum frá at fara til Saudiarabia, og amerikanarar, sum eru har, eiga at fara haðani.

Stjórin sigur, at hon hevur fingið álítandi upplýsingar um, at yvirgangsmenn ætla at søkja at amerikonskum og vesturlendskum áhugamálum. Eitt nú sigur stjórnin seg hava fingið ábendingar um, at ætlanir eru um atsóknir at íbúðarbýlingum í saudiarabiska høvuðsstaðnum Riyadh.

Uttanríkisráðið í Washington heldur, at amerikanarar, sum arbeiða í Saudiarabia, og sum royna at gerast partur av tí saudiarabiska samfelagnum, eru í serliga stórum vanda. Víst verður á, at verkfrøðingurin Paul Marshall Johnson búði ímillum saudiarabar, til hann bleiv burturfluttur og avrættaður í síðstu viku.

## Misnøgd við Blair

Elizabeth drotning er eftir øllum at døma ikki nøgd við Tony Blair, forsætisráðharra.

Ein kelda í hóvinum hjá drotningini sigur við blaðið Daily Express, at drotningin heldur seg ikki fáa nóg mikið at vita frá forsætisráðharranum, og at hon tí hevur samband við aðrar ráðharrar, so hon kann fylgja við. Sambært kelduni er Tony Blair tann forsætisráðharrin, sum hevur víst drotningini ta minstu virðingina tey 50 árini, hon hevur sitið á trúnuni.

Eitt nú skal drotningin vera misnøgd við, at Blair hevur hildið hana uttanfyri fleiri týðandi avgerðir. Millum annað skal hann ikki hava kunnað drotningina um avgerðina at halda fólkaatkvøðu um ta nýggju ES-grundlógina, skrivar Daily Express.

## Blaðstjóri myrdur

Myndugleikarnir í Meksiko hava biðið amerikonsku samveldisløgregluna FBI hjálpa sær at kanna umstøðurnar í sambandi við, at blaðstjórin Francisco Ortiz bleiv myrdur herfyri.

Meksikonsku myndugleikarnir hava illgruna um, at brotsmenn, sum fáast við at smugla rúsevni úr Meksiko til USA, skipaðu fyri morðinum. Eygnavitni hava greitt frá, at fýra menn skutu blaðstjóran, tá hann skuldi seta seg í bilin uttan fyri ein handil í býnum Tijuana. Tvey børn og ein annar maður vóru við blaðstjóranum, men tey vórðu ikki rakt.

Francisco Ortiz var blaðsatjóri á blaðnum Zeta, sum er kent fyri at hava avdúkað ymisk viðurskifti í sambandi við svik og skipað lógloysi á markinum ímillum Meksiko og USA. Eitt nú hevur blaðið skrivað nógv um rúsevnissmugling um markið.

## Funnu gamalt tyggigummi

Norskir fornfrøðingar, sum grava í einum øki tætt við Stavanger, hava funnið ymiskt áhugavert í einum bústaði frá víkingatíðini.

Í síðstu viku komu fornfrøðingarnir fram á eina grøv. Í henni funnu teir fleiri lutir, teirra millum eitt spenni úr silvuri. Tað mest sjáldsama var kortini eitt petti av harpiks. Tað var týðiligt, at onkur hevur tugt harpikspettið, og tað hevur fingið fornfrøðingarnar at gita, at børn kanska nýttu harpiks sum eitt slag av tyggigummi í víkingatíðini, skrivar Aftenposten. Fornfrøðingurin Helge Sørheim sigur við blaðið, at tað er einki at ivast í, at børnini í víkingatíðini eins og børn í dag hava gingið og tugt eitt ella annað, og hann heldur tað ikki vera óhugsandi, at tey hava brúkt harpiks sum tyggigummi.

Helge Sørheim leggur tó afturat, at víkingarnir nýttu eisini harpiks til at tetta kør og onnur íløt, og at teir tugdu tað fyri at gera tað bleytari. So kanska hevur tað gamla harpikspettið ikki verið tyggigummi kortini.

# Krígsbrotsverk skulu kannast

**Altjóða krígsbrotsmannadómstólurin fer at kanna skuldsetingar um neyðtøkur og píning í Kongo. Hann skal eisini kanna skuldsetingar um, at børn verða brúkt sum hermenn.**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Nógv túsund fólk eru flýdd undan bardøgunum í Kongo. Myndin er úr einari flóttafólkalegu í Burundi, har 20.000 fólk úr Kongo eru*

Kanningin í Kongo er tann fyrsta, sum krígsbrotsmannadómstólurin hevur tikið stig til, síðani hann bleiv skipaður.

– Hetta er eitt stórt stig fram ímóti altjóða rættvísi, sigur høvuðsákærin hjá dómstólinum, Luis Moreno-Ocampo.

Bardagar í landnyrðingspartinum av Kongo hava kravt umleið 50.000 mannalív tey seinastu fimm árini, men altjóða krígsbrotsmannadómstólurin kann ikki kanna ákærur, sum eru eldri enn tvey ár, tí dómstólurin bleiv ikki stovnaður fyrr enn í 2002.

Mannarættindafelagsskapir hava fleiri ferðir kært seg um, at teir stríðandi partarnir í Kongo hava framt krígsbrotsverk av ymsum slagi, og teir fegnast um, at altjóða dómstólurin nú tekur málið upp.

– Hetta er eitt sera týðandi stig í arbeiðinum at revsa tey, sum skipa fyri hópmorðum, skipaðum neyðtøkum og etniskari útreinskan, sigur Richard Dicker í mannarættindafelagsskapinum Human Rights Watch.

# Bush í hørðum andróðri

**Myndirnar úr Irak og tey ótryggu viðurskiftini har gera, at George W. Bush færr minni og minni undirtøku frá veljarunum. Tað kemur mótvalevni hansara tilgóðar**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein mánað aftan á atsóknirnar at World Trade Center og Pentagon søgdu 92 prosent av amerikanarunum, at George W. Bush, forseti, hevði røkt sítt arbeiði væl. Men nú er vent í holuni. Sambært einari nýggjari kanning siga 47 prosent, at tey eru nøgd við arbeiði hansara, og 51 prosent eru misnøgd.

Kanningin, sum sjónvarpið ABC hevur gjørt, vísir eisini, at umdømi forsetans er versnað nógv í hesum árinum. Tá amerikanarar fyri tveimum mánaðum síðani vórðu spurdir, hvør av teimum báðum forsetavalevnunum, Bush ella John Kerry, er betur egnaður at leiða bardagan ímóti yvirgangi, var Bush 21 prosentstig framman fyri Kerry. Men so er ikki longur. Í kanningini hjá ABC siga 47 prosent, at Bush er betri egnaður, men 48 prosent halda, at Kerry er tann rætti maðurin.

Kanningin vísir eisini, at hevði forsetaval verið í USA nú, hevði John Kerry vunnið. Hann hevði fingið 48 prosent, Bush hevði fingið 42, og tað triðja valevnið, Ralph nader, hevði fingið sjey prosent.

# Hungur hóttir Zimbabwe

**Hungur hóttir ZimbabweMeiri enn tvær milliónir fólk í Zimbabwe fara at líða hungur seinni í ár**

HUNGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Altjóða hjálparfelagsskapir og ST siga, at nógv fólk í Zimbabwe fara at hava ov lítið til matna seinni í ár, og at viðurskiftini fara neyvan at batna fyrr enn einaferð næsta vár.

ST heldur, at umleið 2,3 milliónir fólk fara at hava tørv á mati úr útlondum, men summir felagsskapir halda, at talið verður nógv størri. Onkur felagsskapur vil vera við, at umleið fimm milliónir zimbabwar fara at hava ov lítið til matna.

Forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, segði fyri stuttum, at eingin í landi hansara líður hungur, og at landið verður heldur ikki rakt av hungursneyð.

– Okkum tørvar ikki mat úr útheiminum, segði hann.

# ítróttur

Nr. 119 • fríggjadagur • 25. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Fakta um dystin

**NSÍ-Skála 2-0 (1-0)**
1-0: Gert Langgaard 45.
2-0: Súni Fríði Barbá 79.
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen — Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Dánial Hansen, Sjúrður Jacobsen (Andy Olsen, 80.) — Aleksandar Jovevic (Súni Fríði Barbá, 61.)), Ian Højgaard (Kári Hansen, 55.), Jústinus R. Hansen — Helgi L. Petersen, Gert Langgaard, Jónstein Petersen
*Gult kort:* Helgi L. Petersen og Sjúrður Jacobsen
**Skála:** Igor Bjarni Kostic (Heini Kristiansen, 31.) — Bárður Danielsen, Arnhold Berg, Dusan Jaic, Iulian Florescu - Hanus Thorleifsson, Rúni Rasmussen, Nenad Stankovic, Eugen Stanciu (Ronni Hansen, 82.) — Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen
*Gult kort:* Bárður Danielsen og Rúni Rasmussen

NSÍ-Skála 2-0 (1-0):

# Skála sett upp á pláss

**Við høgari ferð og væl skipaðum pressspæli eydnaðist NSÍ í 1. hálvleiki at seta seg á skálamenn, sum ikki høvdu neyðugu tyngdina, tá ið teir eftir steðgin royndu at koma afturíaftur, og so staðfesti heimaliðið sigurin, ið lyftir teir upp á heiðursmerkjapláss**

NSÍ-SKÁLA
*Jóannes Hansen*



*Gert Langgaard var annar av málskjúttunum, tá runavíkingar – sum teir fyrstu – sendu Skála stigaleyst úr landskappingardysti í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

NSÍ steðgaði glæsiligu gongdini hjá Skála. Í góðveðrinum mikukvøldið, tá ið áskoðarafjøldin við Løkin var størri, enn hon nakrantíð hevur verið fyrr í ár, vann heimaliðið 2-0 á oddaliðnum. Harvið er NSÍ komið fram á heiðursmerkjapláss. Hugburðurin og avrikið ímóti Skála boðaðu frá, at NSÍ avgjørt má roknast millum teirra, sum eru við í FM stríðnum.

Serliga í fyrra umfarinum var heimaliðið greitt omaná. Teir vóru í einum geari hægri enn gestirnir. Skálamenn fingu ongantíð frið at fáa tamarhald á sínum spæli. NSÍ miðvøllurin arbeiddi hart og møtti mótstøðumonnunum langt frammi á vøllinum. Jústinus R. Hansen, Ian Højgaard og Aleksandar Jovevic vóru eyðsýndir á miðvøllinum, Brynjolvur Nielsen og Sjúrður Jacobsen bjóðaðu seg væl til í borðunum, og teir tríggir fremstu hjá NSÍ arbeiddu nógv.

Men leingi tóktist tað sum um, at Skála skuldi sleppa heilskapað burturúr 1. hálvleiki. NSÍ hevði fleiri deyðbóltsstøður, sum tóktust vandamiklar, men tað var sjáldan, at Igor Kostic í Skála málinum varð settur á stóru royndirnar, áðrenn hann skaddur noyddist at taka seg av vøllinum. 18 ára gamli Heini Kristiansen loysti hann av, uttan at hetta tóktist at nerva styrkina millum stólparnar nakað serligt.

Rættuliga avgerandi fyri gongdina var tað, at NSÍ fekk mál í síðstu royndini undan steðginum. Sum so ofta frammanundan so fangaði NSÍ miðvøllurin bóltin, tá ið Skála royndi at mynda álop í vinstru, har teir vóru væl tynnri hesa ferð, enn teir hava verið fyrr í ár. Aleksandar Jovevic legði bóltin fram um Skálaverjuna, Gert Langgaard fekk tak á, rann einar tjúgu metrar við trimum verjuspælarum í hølinum. Skála málverjin kom út ímóti og hálvbjargaði, men tað var ikki nóg gott av verjuspælarunum, at tað skuldi vera einsamalli NSÍ arin, ið fekk fatur á returbóltinum, og trillaði hann í tóma málið.

Harvið hevði NSÍ sinniliga yvirskotið undir hvíldini. Eftir steðgin fór leikferðin eitt sindur niður, og NSÍ tók seg eitt vet aftur og bíðaði. Tað bar við sær, at Skála hevðí bóltin meiri. Teir funnu betri hvønn annan, og teir vóru nakrar ferðir í NSÍ brotsteiginum. Men teir fingu ongantíð ferð á samanspælið, og teir gjørdu framvegis ov nógv mistøk. Dánial Hansen og Óli Hansen høvdu Jónhard Frederiksberg og Boga Gregersen í stuttum tjóðri, og Jens Martin Knudsen varð ongantíð settur á serligar royndir.

Ellivu minuttir undan leikloki varð alt avgjørt. Eftir deyðbóltsstøðu í høgru og út frá aftur, legði Brynjolvur Nielsen høgt inn um verjuna, sum var á veg fram. Á rangstøðumarkinum gjørdist innskifti Súni Fríði Barbá blankur og skoraði til 2-0.

### Missurin kostaði

Hóast nógv er á skránni hjá NSÍ, so vóru teir væl upplagdir. Tá ið Ian Højgaard noyddist at fara skaddur av vøllinum, bilti tað ikki so nógv, tí avloysararnir vóru klárir at traðka til. Helgi L. Petersen og Jónstein Petersen vóru skjótir og ágangandi í borðunum, og fremstu menninir gjørdu tað, sum tað kann roknast við av álopsspælarum.

Skála spældi ikki so væl, sum teir hava gjørt í nógvu av undanfarnu umførunum. Tað var eyðsýnt, at liðið leið nógv undir, at miðvallar generalurin og liðformaðurin, Pauli G. Hansen, ikki var førur fyri at spæla, og at Alexandur Johansen heldur ikki var við. Hetta hevði fleiri umskipingar við sær, og tað gekk út yvir rútmuna í samanspælinum og tyngdina og hugflogið, tá ið álop skuldu myndast. Hóast Skála í 2. hálvleiki fleiri ferðir var í NSÍ brotsteiginum, so var ongantíð neyðugt hjá Jens Martini Knudsen at vísa, at tað framvegis er dugur í honum.

NSÍ avrikið boðaði frá, at teir ætla sær at vera við, har tað er hugaligt at stríðast í landskappingini og steypakappingini, og teir gjørdu eisini góða reklamu fyri sær sjálvum, áðrenn teir í morgin fara at spæla á heimavølli í Intertoto.

Hvørja ávirkan tapið fer at hava á Skála liðið fæst at síggja sunnudagin, tá ið teir fáa vitjan av EBStreymi.



## Málverjin breyt hondina

Skála vitjanin hinumegin fjørðin kostaði nógv. Eitt er, at teir einki stig fingu við til hús aftur. Eitt annað er tað, at málverjin, Igor Bjarni Kostic, noyddist av vøllinum við nógvari pínu. Seinni vísti tað seg, at okkurt bein var brotið í hondini.

- Higartil hava vit verið hampuliga spardir fyri skaðar. Nú vórðu vit orduliga raktir. Pauli G. Hansen er orduliga skaddur, men vit vóna, at hann verður tøkur aftur eftir summarsteðgin. Alexandur Johansen var sjúkur mikudagin. Hann verður ivaleyst við sunnudagin. Tíbetur eiga vit í Heina Kristiansen góðan eykamálverja. Men vit mugu staðfesta, at tað kennist meint, tá ið fleiri eru burturi, sigur Pauli Poulsen, hjálparvenjari á Skála. Hann heldur ikki, at tað er nakað at siga til, at NSÍ vann.

- Vit spældu ikki væl, og teir vóru væl skipaðir og grammir. Vit megnaðu ongantíð at spæla okkum til upplagdar málmøguleikar, og tá ber ikki til at vinna.

Á Skála vóna teir, at Sveinur Justinussen verður við eftir summarsteðgin. Hann hevur vant eitt sindur, men hevur annars hugsað mest um at fáa studentsprógvið frá hondini. Tað fekk hann í gjár, og nú fer hann at hjálpa Skála. Í fjør var gávuríki bóltspælarin ein tann stinnasti á Skála miðvøllinum. *jh*